gult cyan magenta svart

Vágbingar ala fisk til kræsnar gómar



Solei›is sær ein hvasskvoysa út. Hetta er ikki kendur fiskur um okkkara lei›ir. Men gongur sum ætla›, fer hesin flatfiskurin skjótt at geva føroyskum vinnulívi eitt bein afturat at standa á. Vágbingurin, Jacob Eli Müller, ætlar sær at ala hvasskvoysu í Vági. Í Danmark kemur prísurin á hesum fiskaslagi upp á 100 krónur fyri kilo

Vágbingar prógva enn einafer›, at teir hava hugflog og dirvi til at bróta upp úr n‡ggjum. Nú ætla teir sær undir eitt slag av fiskaaling, sum er n‡tt í Føroyum. Talan er um eina luksusvøru og sum er nógv d‡rari enn laksur

VINNULÍV
Áki Bertholdsen

Ta› hevur veri› stór framgongd í vinnulívinum í Vági tey seinastu árini. Umframt tær vanligu vinnugreinarnar, hevur eisini okkurt sló›brótandi virksemi stungi› seg upp. Hugsa› ver›ur sjálvandi um teir serligu trollemmarnar hjá Injector Doors, sum hava vakt ans ví›a hvar.

Og nú fara vágbingar aftur undir eitt sló›brótandi virki. Eisini hetta virki› er tengt at sjónum, men hesufer› er ta› ta› livandi tilfeingi, sum talan er um.

Ta› er Jacob Eli Müller í Vági, sum nú ætlar sær undir eitt slag av fiskaaling, sum er spildurn‡tt í Føroyum.

Hann ætlar sær nevniliga at ala hvasskvoysu, ella tindaskalli í Vági. Hvasskvoysa er tann fiskurin, sum á donskum eitur pighvarre. Á føroyskum gongur hann eisini undir navninum tindaskalli.

Hetta er ein flatfiskur. Hann er næstan trillrundur, og livur, sum a›rir flatfiskar, ni›ri á botni.

Men hetta er ein sera d‡rmettur fiskur og tískil er markna›arprísurin eisini sera høgur.

Hjá okkum er hann ikki so d‡rur, men a›rasta›ni er prísurin væl hægri enn á laksi. Eitt nú hava fiskaseljarar uppl‡st fyri okkum, at í Danmark kann prísurin koma upp á 100 krónur fyri kilo.

Hesi seinastu árini er nógv gjørt fyri at menna aling av hvasskvoysu, bæ›i í Danmark og í Noregi. Og nú leggja so eisini vágbingar til brots.

Samstarv vi› SEV

Ætlanin hjá Jacob Eli Müller er nú komin so miki› álei›is, at hann hevur søkt kommununa um stykki at byggja virki› á.

Hann søkti um eitt stykki uppá 2000 fermetrar, sum hann ætlar at reisa virki› á. Máli› var fyri á b‡rá›sfundi í Vági t‡skvøldi› og har var› einmælt samtykt at játta› honum stykki›.

Stykki› liggur beint vi› elverki› hjá SEV inni á Oyrunum í Vági.

Og ta› er ikki av tilvild at virki› skal byggjast undir li›ini á SEV.

Tí fyri at ala hvasskvoysu, krevst, at vatni› hevur ein ávísan hita.

Tí hevur stigtakarin havt samrá›ingar vi› SEV um at fáa loyvi at brúka ta› heita avlopsvatni› frá elverkinum til alivirki›.

Uppl‡st var á b‡rá›sfundinum í Vági, at hesar samrá›ingar høvdu gingi› sera væl, og at SEV var ógvuliga huga› fyri at lata avlopsvatni› til endamáli›. Men hóast talan er um n‡skapandi virki› í Føroyum, byrjar Jacob Eli Müller ikki púra á berum, tí ta› kom undir vi›ger›ini í B‡rá›num, at hann hevur gott samstarv vi› danska fyritøku, sum er væl kunnug vi› hetta slagi› av aling.

Tíverri eydna›ist ikki at fáa fatur á Jacob Eli Müller sjálvum.

Nýggj SMS (Short Message System)-støð hjá Føroya Tele

Sig tað bókstaviliga

Tann 1. november lat Føroya Tele sína egnu SMS-støð upp í Føroyum, soleiðis at tað nú er møguligt hjá øllum GSM-felagum hjá Føroya Tele at senda og móttaka tekstboð um fartelefonina...

Sig tað við bókstavum
Við SMS kanst tú senda og móttaka tekstboð um tína fartelefon - og tað er sera lætt. Men áðrenn boð kunnu sendast, skal tað nýggja nummarið á SMS-støðini tastast inn í fartelefonina. Nýggja nummarið er

+298249020

Í vegleiðingini til fartelefonina sæst hvussu hetta verður gjørt. Tey, ið áður hava sent SMS-boð um tað íslendsku støðina (+354 8900100), skulu sostatt broyta hetta nummarið til +298249020.

Tað kostar bert 0,90 kr.
Í sambandi við ta nýggju SMS-støðina verður prísurin á SMS-boðum eisini settur niður. At senda eini SMS-boð kostar nú einans 0,90 kr. fyri hvørt boð frá øllum GSM-haldum - íroknað Føroya Teletíð haldum. Tað er líkamikið, nær boðini verða send og um boðini verða send innanlands ella til útlond. Tað er ókeypis at móttaka eini SMS-boð.

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

So bíligt er tað!
*Landsimi 1,50 kr. • TeleDanmark 1,00 kr. • TeleNor 0,93 kr. • Telia 1,30 kr. • **Føroya Tele 0,90 kr.***
(Omanfyri sæst hvat tað kostar at senda eini tekstboð við einum teletíðarhaldi í hinum norðurlondunum samanborið við kostnaðin hjá Føroya Tele - pr. 30. okt. 2000)

petur & petur • 320870

Tí›indaskriv:

Amnesty barnatiltak í Nor›urlandahúsinum

Amnesty í Føroyum skipar fyri barnakonsert í Nor›urlandahúsinum sunnudagin 19. november kl. 16. Á skránni eru Kular Røtur úr Klaksvík og kór vi› 4. A og B úr Venjingarskúlanum. Í forhøllini fer barnabólkurin at hava eina frams‡ning fyri børn um børn. Her fáa fólk møguleika at kunna seg eitt sindur um arbei›i› hjá Amnesty. Eisini ber til at senda áheitanir til ríkislei›arar um at ste›ga píning.

Tiltaki› ver›ur fyriskipa› í sambandi vi›, at 20. november er altjó›a barnarættindadagur. Felagi› ynskir at n‡ta høvi› at l‡sa stø›una hjá børnum a›rasta›ni í heiminum, og vísa hvussu vit kunnu hjálpa teimum, i› ikki hava ta› so gott, sum vit í Føroyum.

Forsølan av atgongumerkjum byrjar í Kunningarstovuni og í Nor›urlandahúsinum fríggjadagin. Kostna›urin er 80 kr. Írokna› er okkurt at leska sær vi›, sum MBM letur. Alt arbei›i› ver›ur gjørt sjálvbo›i›. Vinningurin fer óskerdur til arbei›i› hjá Amnesty í Føroyum.

Amnesty International Føroya Deild

Nógv virksemi í Runavík

Íbú›arbygging, parkeringspláss og skúlaumvæling eru nakrar av verkætlanunum, sum eru í gongd í Runavíkar Kommunu

KOMMUNUMÁL
Edvard Joensen, Runavík:

Runavíkar Kommuna er í stø›ugari menning. Handilsbygningar og íbú›ir eru nøkur av næstu stigunum, tikin ver›a.

Oman fyri Eysturoyar Røktar- og Ellisheim ver›a væntandi fleiri smærri íbú›ir bygdar komandi ár, sigur Jákup Lamhauge, b‡rá›sforma›ur í Runavík.

Talan er um verkætlan, sum Høgni Mikkelsen, byggimeistari, fer at gera. Jákup Lamhauge sigur, at ætlanin er at byggja fleiri smærri íbú›ir, sum fólk, i› vilja sleppa úr størri húsum, so kunnu ogna sær. Lendi› til bygginginga er keypt, sigur b‡rá›sforma›urin, men enn er arbei›i› ikki fari› í gongd. B‡rá›sforma›urin sigur, at ætlanin var at bygja í ár, men hetta var› útsett. Stutt og greitt tí, at fólk fekst ikki at gera arbei›i›.

Runavíkar Kommuna letur íbú›irnar byggja, men fer ikki at eiga tær, tá li›ugt er. Fólk, sum ætla at flyta í tær, fara at keypa tær aftur frá kommununi.

Skúlin á Glyvrum ver›ur høvu›sumvældur. Hetta er stórarbei›i, sum hevur sta›i› vi› eina tí›, og enn ikki er li›ugt.

Jákup Lamhauge sigur, at alt ver›ur rivi› innan úr skúlanum, Solei›is bókstaviliga. Sí›an ver›ur gjørt av n‡ggjum aftur. Arbeitt hevur higartil veri› fyri einar sjey-átta milliónir seinastu f‡ra árini, og hildi› ver›ur fram, til komi› er gjøgnum allan skúlan, sum hann er.

Skúlin er frá 1958, og krøvini vóru ikki tey somu til skúlan tá, sum tey eru nú.

Annars ver›ur kanna›, hvussu gerast skal vi› skúlaverki› í Runavíkar Kommunu sum heild, sigur b‡rá›sforma›urin. Skúlin er vi› at koma í hølistrupulleikar. Í løtuni eru f‡ra kommunalir skúlar í kommununi. Í Rituvík, Runavík, Glyvrum og Søldarfir›i. Um ein n‡ggjur, stórur meginskúli skal byggjast, ella hvussu farast skal fram, má naka› skjótt fáast ein avger› um, skilst á b‡rá›sformanninum.

Eisini handilsvinnan í Runavík er í menning. Eitt n‡tt, stórt handilshús ver›ur bygt naka› skjótt í Runavík, og Runavíkar Kommuna hevur samtykt at gera parkeringsøki til bygningin. Talan ver›ur um kjallaran í hesum n‡ggja handilsbygninginum, sum kommunan skal eiga.

Ta› er solei›is, sigur Jákup Lamhauge, b‡rá›sforma›ur, at Runavíkar Kommuna eigur øll parkeringsplássini fram vi› høvu›svegnum vi› undantaki av onkrum lítlum øki onkusta›ni. Tí var› eisini hildi› rætt, at kommunan gjørdi parkeringsplássi› til hendan n‡ggja bygningin og sjálv eigur ta›.

N‡ggjur goymslu- og handilsbygningur ver›ur bygdur millum havanarlagi› og høvu›svegin í Runavík
Mynd: Edvard Joensen

Eisini annar bygningur er í ger beint oman fyri havnarlagi›. Ta› er eitt rei›aravirki, sum byggir goymslubynging vi› havnina. Bygningurin ver›ur í trimum hæddum, har ni›asta hæddin ver›ur goymslurúm í smaband vi› fiskivinnuna, me›an tær bá›ar ovaru ver›a til handilsvinnu og skrivstovuhøli.

Annars er n‡ggja saltgoymslan, sum føroyska-íslendska felagi› Hafnarbakki hevur bygt á Glyvrum, li›ugt og klárt at taka í móti fyrstu saltlastini. Væntandi kemur fyrsta skipi› einafer› beint eftir mána›arskifti›, sigur Jákup Lamhauge b‡rá›sforma›ur í Runavík, sum ikki stillar upp aftur til kommunuvali› í næstu viku.

Heilsufrø›iliga Starvsstovan flytur í n‡ggj høli

Hølistrupulleikar noy›a Heilsufrø›iligu Starvsstovuna at flyta ein part av virkseminum í bygningin hjá Svend Krosstein á Falkavegnum. Økt virksemi krevur størri hølir, og tí ver›ur ney›ugt at taka hetta stigi›, men enn er leigusáttmáli ikki gjørdur. Hóast alt virksemi› nú ikki er savna› undir einari lon, so heldur Bár›ur Enni, stjóri, ikki, at hetta ver›ur nakar vansi í arbei›num

HEILSUFRØ‹ILIGA STARVSSTOVAN
Stefan í Skorini

Orsøkin til, at starvsstovan nú fær brúk fyri meira plássi, er, at stovnurin hevur fingi› fleiri uppgávur latnar í hendi av landsst‡rinum seinastu árini. Eisini er tørvurin av kanningum vaksin hesa tí›ina. Í 1997 vór›u 20.000 kanningar gjørdar, me›an 32.000 kanningar vór›u gjørdar í 1999. Økta tali› krevur sjálvandi betri umstø›ur.

Talan er um eftirlitsdeildina, sum skal flyta ni›an í hølini hjá Svend Krosstein uppi á Hálsi, me›an kanningardeildin framvegis ver›ur á Debesartrø›.

Enn er alt ikki komi› uppá pláss vi›víkjandi leigusáttmálanum, og Fíggjarmálast‡ri› skal eisini gó›kenna sáttmálan, á›renn fari› ver›ur í gongd vi› at flyta.

– Arbeitt ver›ur vi› at gera leigusáttmála um at leiga hølir til eftirlitsdeildirnar. So skjótt leigusáttmálin er gó›kendur av Fíggjarmálast‡rinum, ver›ur arbei›i› vi› at gera n‡ggju hølini klár sett í verk, solei›is at fólk kunnu flyta út úr starvsstovuhúsinum fyrst í komandi ári, sigur Bár›ur Enni.

Gamal trupulleiki

Bár›ur Enni vísir á, at tørvur hevur veri› á betri hølisvi›urskiftum í tvey ár bæ›i fyri kanningardeildina og eftirlitsdeildina. Arbeitt hevur tí veri› vi› at fáa n‡ggj høli til vega, men ta› hevur ikki eydnast fyrr enn nú.

– Ikki fyrr enn nú hava vit funni› eina hóskandi loysn, eftir at hava arbeitt vi› hesum í tvey ár, tí hetta er ein stór kabala, sum skal ganga upp.

Bár›ur Enni vísir annars á, at tey hava veri› sera væl nøgd vi› verandi høli, men at har er vor›i› ov trongt til alt virksemi›, og um stovnurin skal klára at fylgja vi›, so er ney›ugt vi› n‡ggjum hølum.

Eftir flytingina ver›a arbei›sumstø›urnar betri, bæ›i fyri tey, sum arbei›a vi› eftirliti, men eisini fyri kanningarstovurnar. Hølini á Debesertrø› ver›a í næstum umbygd, so mi›hæddin og loftshæddin bara ver›a n‡ttar til kanningarstovur.

Á fíggjarlógini fyri 2001 og 2002 er skoti› upp at játta› 6,5 milliónir krónur um ári› í 2 ár, tilsamans 13 milliónir krónur til hesa umbygging.

Arbei›i› hjá Heilsufrø›iligu Starvsstovuni ver›ur tí í framtí›ini b‡tt í tvey. Kanningardeildin ver›ur í hølunum á Debesartrø›, me›an eftirlitsdeildin eftir øllum at døma flytir ni›an á Falkaveg á Hálsi.

– Sum heild er ta› kanska ikki ein fyrimunur, at virksemi› ver›ur b‡tt út á fleiri stø›, men hinvegin ber ta› til at skipa solei›is fyri, at øll arbei›a á somu innanh‡sis skipanum. Ta› skal vera solei›is, at ta› ikki ger naka›, um stovnurin hevur fleiri adressir, men at ta› kanska fer at vísa seg at vera ein fyrimunur. Ætlanin er, at stovnurin skal koyra á einum telduneti og á somu telefonskipan, sigur Bár›ur Enni.

HEIMA BIO



The Beach



Mission to Mars

VIDEOTOP 10

VIKA 46

1 The Beach
2 Three Kings
3 Double Jeopardy
4 Blue Streak
5 Anna og Kongen
6 Kissing a Fool
7 American Beauty
8 The Haunting
9 007 -The World is not Enough
10 Bowfinger

Í Gundadali	tel. 31 47 70
Í Kollafirði	tel. 42 10 83
Í Saltangará	tel. 44 91 33
Í Klaksvík	tel. 45 73 53
Í Sørvági	tel. 33 20 01
Í Leirvík	tel. 44 33 60
Í Skálafirði	tel. 44 12 00

STATOIL
støðirnar kring landið

petur & petur 320870